Teir »gomlu« aftur á pallin

Friggjadagin í næstu viku verður ein poppkonsert í Ítróttarhøllini á Hálsi. Tað er Ungmannafelagið Skansastova, sum skipar fyri, og hetta verður ikki nøkur vanlig konsert. Tað eru teir gomlu — teir frá 60unum — sum fara at spæla hetta friggjakvøldið. Har verða Faroe Boys, Cream Crackers, Islanders, Simme og tey, Rabbits, Flamingo, Tey av Kamarinum, X-Rays, Rúnar og kanska eisini Torv úr Havn, Silly Boys úr Fuglafirði og Thunderbirds úr Vestmanna. Tilsamans 35—40 mans spæla í hesum orkestrum.

3000 atgongumerki eru gjørd til konsertina. Tey kosta 35 kr. og eru at fáa hjá S. H. Jacobsen og í Nýggja Bókhandli.

Tað er ein av ítyrrverandi formonnunum í Skansastovu, Magni Arge, sum hevur tikið stig til at halda hesa konsertina. Vit hava prátað við Magna:

— Hví gera tit eina konsert við gomlum bólkum?


— Tað er fyrst og fremst tí, vit hildu tað vera eitt frálíkt hugskot. Tað er ikki bara frálíkt fyri okkum at hoyra teir, sum spældu tá í 60unum, tað er eisini stuttligt hjá teimum sjálvum at hittast og spæla saman aftur og — ikki minst — hjá teimum fólkunum, sum vóru ung tá í tíðini. Tey hava ikki havt nøkur tilboð tey seinastu árini, so tí verður tað stuttligt hjá teimum at hoyra hesar bólkarnar spæla aftur.

— Hvussu hevur gingist at fáa bólkarnar við til hetta?

— Tað hevur gingist óvæntað væl. Vit væntaðu, at teir, sum ikki hava spælt í langa tíð, ikki vildu vera við. Men tað hevur víst seg, at allir hava áhuga fyri hesum.



Brilliantinuárini — úr Sjónleikarhúsinum í 1967



Ein av teimum, sum var ungur í tryssunum — og framvegis er ungur. Hetta er bassspælarin Kolbein Simonsen, 12 ár...

— Eru allir bólkarnir rætt mannaðir?

— Teir hava helst ta røttu manningina. Men teir flestu hava skift út fyrr ella seinni. Til dømis Cream Crackers, næstan allir tónleikarar hava spælt í hesum bólki. Men – tað ber illa til at hava meira enn ta einu manningina á konsertini.

Hinvegin hava vit so at siga alla ta røttu manningina í Faroe Boys til dømis.

— Fáa bólkarnir nakra samsýning fyri at spæla á konsertini?

— Teir fáa bert ta samsýning, at vit gera eina veitslu fyri teimum aftaná. So man kann ikki siga annað enn, at teir gera tað av vælvild.

Tiggju ár síðani

Magni Arge sigur, at seinast hesir bólkar spældu á konsertum, var í 1967 í Sjónleikarhúsinum. Og aftur í 1969 var ein poppkonsert í Havn. Fyri nøkrum árum síðani var ein væleydnað konsert í Vestmanna við gomlum bólkum hadani.

— Ætla tit at hava dans aftaná konsertina?

— Vit hava ætlanir um at hava dans í Klubbanum við gomlum dansiløgum. Men eg haldi ikki, man kann krevja av teimum gomlu bólkunum, at teir skulu spæla til dans eisini hetta kvøldið. Tað hevði verið ov nógv kravt, fleiri av teimum hava ikki spælt í 10 ár. Men, sjálvandi, hava teir hug, so eru teir vælkomnir.

Ikki umaftur

Magni Arge sigur, at eini 8—900 atgongumerki skulu seljast fyri at Skansastova ikki skal hava tap av konsertini. Verður høllin hinvegin fullsett, verður vinningurin 50.000 kr. og hann fer óskerdur til Skansastovu. Hann sigur, at tað er óhugsandi at halda eina eykakonsert, um tað verður útselt fríggjakvøldið.

Annars sigur Magni, at tað so við og við er blivin ein trupulleiki í sambandi við at halda slíkar konsertir, at nøkur ikki duga at bera seg millum onnur.

— Vit hava sæð, at stólar og annað verður brotið, so tað er ikki so lætt longur at lána stólar niðan í Høllina. Skúlarnir vilja ikki av við teir, tí tað kostar teimum ov nógv. Eg haldi, at Høllin sjálv skuldi átt stólar, so tað slapst undan at lána stólar niðan. Vit lata hóast alt 6—7.000 kr. í leigu fyri Høllina og skulu lata hana aftur í sama standi, sum vit taka við henni.

— Hvussu leingi leiga tit hana?

— Í 24 tímar.



Havnar Jazzfelag hevur givið út sína 5. plátu, og hesaferð eru tað VÆLFERÐAR-VÍSUR við Kára Petersen. Á plátuni eru 14 løg og tey eru innspæld í Íslandi í summar, eina viku um náttina, sigur Kári. Seks íslendingar spæla saman við Kára á plátuni og summir av teimum høvdu ikki tíð uttan um náttina.

Av teimum 14 løgunum eru summi gjørd til plátuna, men onnur eru eldri og eru kend úr til dømis studentakabarettum.


Kári og Hanus Andreassen hava gjørt tekstin til flestu løgini. Allir tekstirnir eru prentaðir á plátuhúsanum.

Plátan skuldi verið komin fyrr, sigur Kári. Men reporfilmurin til húsan, sum varð gjørdur í Føroyum, hvarv í danska postverkinum á veg til prentsmiðjuna í Keypmannahavn, hóast hann varð sendur bæði innskrivaður og express. Tað tók 20 dagar at finna hann.

Vit fara í næsta blað at ummæla vælferðarvísur.

Vit ynskja viðskiftafólki okkara og øllum Føroya fólki eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýttár.

Fa. Snikkaravirkið í Stoffalág



Loysnin á krossorðinum í nr. 95